# ílaflokk

lítið frægari, tá Sosialurin vitjaði flokkin. Tey vóru beint tá á veg til ein lestrarvegleiðara fyri at spyrja, um nakað var at gera í málinum.

– Hetta var ordiliga keðiligt, tí vit hava havt eitt so øgiliga gott samanhald. Vit hava kanska ikki altíð verið so arbeiðssom, men vit hava havt tað sera, sera gott saman, sigur ein av gentunum í flokkinum.

Ein onnur tekur undir við henni beinanvegin, og spyr, hvat politikkarnir hugsa fyri sær: Teir tosa um Føroyar sum verðins besta samfelag í 2015, samstundis sum teir oyðileggja skúlan fyri tey og teirra flokk.

### Svarið í vindinum

Sambært ætlanini verða nemingarnir í 2.A býttir sundir og fluttir í hinar tríggjar flokkarnar á málsligu deild.

Men av tí at ein nemingur verður í avlopi, er ikki óhugsandi, at hesin nemingurin má allan vegin yvir í matematisku deild at ganga seinasta skúlaárið í Hoydølum.

Enn er tó ikki avgjørt, hvør nemingur fer í hvønn flokkin, og hvør hesin eini nemingurin er, sum møguliga má skifta lestrarhest.

Rektarin spurdi um tey sjálvi vóru hugað at finna fram til hetta býtið, men tað fór helst at gerast ein alt ov tung uppgáva fyri tey.

Svarið uppá henda spurningin og hesa truplu uppgávuna blaktar tí framvegis í skúlapolitiska vindinum.

### Splittað sundur

Fyri nemingarnar í 2.A var hetta tað ringasta sum kundi henda. Spurningurin er nú, hvat tey fara at gera.

Tann fyrsta reaktiónin hjá onkrum teirra var, at tey snøgt sagt bara fóru úr skúlanum. Onkur hevði hug at ganga 2. árið umaftur, soleiðis at viðkomandi kundi fáa tvey ár saman við sínum nýggja flokki.

– Veitst tú hvat – tað er líkasum sum øll studentatíðin er oyðiløgd. Nú verða vit splittað sundur, og tað hendir nú, og júst nú, ið vit skulu fyrireika okkum at fara í 3. g.

– Tað er akkurát sum eg longu nú havi bestan hugin bara at gloyma alt um hesi árini í Hoydølum, sigur ein genta.

### Studentabílat og húgvan

Hon fær undirtøku frá fleiri av hinum, sum somuleiðis hava mist allan hugin til víðari skúlagongd beint nú – og tað einans tveir dagar áðrenn royndirnar skulu byrja.

– Eg hevði so glett meg til at gerast studentur saman við hinum í flokkinum næsta ár. At fáa húgvuna á høvdið saman við teimum. At skula taka eina felagsmynd av flokkinum, sum skuldi hanga á vegginum, og síðani at gera okkara egnu t-skjúrtur við øllum nøvnunum á. Men gakk!

– Nú skal eg knappliga uppá eina studentamynd saman við nemingum, sum eg ikki kenni. Nei, tað er lítið hugaligt at ganga í skúla beint nú, sigur hon.

Her er kortini eingin ivi: Lagið er í botni!



# Fugfirðingar áhugaðir í samstarvi við Klaksvík

**Hóskvøldið fer Fuglafjarðar kommuna at viðgera eitt tilboð úr Klaksvík um størri samstarv millum kommunurnar. Borgarstjórin mælir til, at nærri samráðingar verða við Klaksvíkar kommunu**



*– Fuglafjørður og Klaksvík hava hvør í sínum lagi styrkir og veikleikar, og tí ber væl til at ímynda sær, at vit kunnu samstarva á ymsum økjum, sigur Sigurd Simonsen, borgarstjóri í Fuglafirði*

KOMMUNUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

**Fuglafjørður:** Umboð fyri Klaksvíkar kommunu og Fuglafjarðar kommunu høvdu herfyri ein fund um størri samstarv millum tær báðar kommunurnar. Og hesin fundur hevur nú við sær, at málið verður lagt fyri býráðið í Fuglafirði hóskvøldið at taka støðu til.

– Hetta er alt spildurnýtt, og einki ítøkiligt er í málinum enn, men vit hava havt ein fund við umboð fyri Klaksvíkar kommunu, har vit tosaðu um møguleikarnar fyri størri samstrvi millum kommunurnar, og nú hava vit lagt málið fyri býráðið at viðgera, sigur Sigurd Simonsen, borgarstjóri í Fuglafirði.

Tilmælið frá fíggjarnevndini hjá Fuglafjarðar kommunu er, at Fuglafjørður fer at tosa nærri við Klaksvík um størri samstarv.

– Tað eru nógvir møguleikar eru samstarvið, og tað fyrsta, vit skulu gera, er at tosa nærri við Klaksvíkar kommunu um, hvat vit kunnu samstarva um, sigur Sigurd Simonsen.

### Langur vegur

1600 fólk búgva í Fuglafjarðar kommunu. Umleið 200 á Kambsdali, gott 30 á Hellunum og restin í Fuglafirði.

– Fuglafjørður og Klaksvík hava hvør í sínum lagi styrkir og veikleikar, og tí ber væl til at ímynda sær, at vit kunnu samstarva á ymsum økjum. Tað er langur vegur til nakra samanlegging, og hetta snýr seg í fyrstu syftu um samstarv millum tvær kommunur, sigur Sigurd Simonsen

– Vit fara ikki at leypa fram av og ætla okkum eisini at kanna aðrar møguleikar, men vit mæla til, at vit fara í samráðingar við Klaksvíkar kommunu um størri samstarv, sigur borgarstjórin í Fuglafirði.

# Fáa stuðul til bjargingarbát

**Klaksvíkar kommuna er sinnað at lata 400.000 krónur í stuðli til ein bjargingarbát, sum Norðoya Bjargingarfelag ætlar at keypa**

BJARGING
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Norðoya Bjargingarfelag hevur ætlanir um at keypa ein bjargingarbát, sum skal hava heimstað í Klaksvík, og sum kann koma sjómonnum og økinum til hjálpar.

Tí hevur bjargingarfelagið biðið Klaksvíkar kommunu um stuðul til keypið av bátinum. Roknað verður við, at báturin fer at kosta 1 millión krónur, tá ið hann er siglingarklárur, og Norðoya Bjargingarfelag biður um 40 prosent í stuðli.

Eingin játtan er tøk á fíggjarætlanini hjá Klaksvíkar býráð, men undirtøka er fyri at lata stuðulin, og umsitingin mælir til flyting millum konto fyri at finna pengar at lata í stuðli í ár.

Fíggjarnevndin, Havnanevndin og Tekniska nevnd hava øll havt málið til viðgerðar, og tey mæla øll til at lata stuðulin. Málið skuldi verða fyri á býráðsfundi í Klaksvík týskvøldið.

# Kommunumaður í Kalsoynna

**Staðbundnu nevndirnar fyri Mikladal og Trøllanes mælir til at seta eitt kommunalt starvsfólk í starv í Kalsoynni, og tað tekur Klaksvíkar kommuna undir við**

KOMMUNA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

**Kalsoy:** Norðari partur av Kalsoynni, sum er við í Klaksvíkar kommunu, skal nú eisini hava ein kommunumann.

Staðbundnu nevndirnar fyri Trøllanes og Mikladag mæla til, at ein persónur verður settur í starv hjá Klaksvíkar kommunu, sum skal arbeiða í Kalsoynni.

Tekniska nevnd og Fíggjarnevndin hjá Klaksvíkar kommunu hava havt málið til viðgerðar, og báðar nevndirnar taka undir við uppskotinum.

Málið skuldi fyri á býráðsfundi í Klaksvík týskvøldið, og var málið samtykt har, verður søkt eftir einum fólki til starvið.